ítróttur

Nr. 227 • fríggjadagur • 28. november 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo

# Sundalagsmenn vilja sleppa í part

**Hóast lítið hevur verið at hoyrt til uppskotið frá Kommunufelagsskapinum í Sundalagnum um fótbóltshøll, síðani tað í februar varð almannakunngjørt, so meta kommurnar har, at talan framvegis er um eitt sera áhugavert uppskot**




*Ætlandi skal høllin byggjast mest sum inn í landslagið. Hetta hevur sínar fyrmunir, bæði í kostnaði og í útsjónd*

FÓTBÓLTSHØLL
*Jákup Mørk*

Tað kom helst óvart á fleiri, tá vit í seinastu fríggjadagsútgávu okkara staðfestu, at tað eru ítøkiligar ætlanir um eina fótbóltshøll á Lambareði. Ein høll, sum ætlandi skal fíggjast av millum øðrum HatTrick-grunninum hjá UEFA.

Formaðurin í Fótbóltssambandinum segði í farnu viku, at enn hevði FSF als ikki tikið støðu til, hvussu umsitingin av stóra pottinum frá UEFA skuldi fyriskipast. Heldur ikki vildi hann tosa um, hvørt tað vildi verið rætt at nýtt allan peningin til eina høll, ella um talan møguliga bleiv um at spjaða upphæddina, soleiðis at Fótbóltssambandið kanska kundi viðvirka til at fleiri hallir vórðu bygdar, tó at luttøkan hjá FSF í hvørjari einstakari høll tá hevði verið minni.

## Verður helst kapprenning

Um ætlanina á Lambareiði varð annars staðfest, at kostnaðurin av slíkari høll væntandi kom at liggja um 15 mió kr. Verður havt í huga, at samlaði føroyski parturin av HatTrick-grunninum væntandi verður um 12 mió kr., so er helst skjótt at staðfesta, at skal lánsbyrðan hjá høllini ikki verða alt ov stór, so røkkur peningurin neyvan til meira enn eina einstaka fótbóltshøll.

Sum dømi um hetta kann Gundadalshøllin í Havn nevnast. Her verðut at kalla hvør tann einasti tímin nýttur, men hóast hetta, so megnaði høllin ikki at bera stórt meira enn milliónina í lánibyrðu.

Tí kundi tað í stóran mun bent á, at talan í hesum umfarinum bert verður um tí einu fótbóltshøllina í landinum, og tá er so einki at siga til, um ein ávís kapprenning og eitt ávíst lobbyarbeiði í løtuni fer fram millum teirra, sum vilja sleppa framat við eini slíkari høll.

Umframt høllina á Lambareiði, so nevndu vit í fríggjadagsblaðnum, at høvuðsstaðarfeløgini hava heitt á Býráðið í Havn um at hyggja at, hvørjar møguleikar tey hava at vera við í slíkari verkætlan.

Og so er tað eisini projektið um eina fótbóltshøll í Sundalagnum. Hetta varð lagt fyri aðalfundin hjá FSF tíðliga í ár, men síðani hetta hevur millum lítið og einki verið at hoyrt til verkætlanina.

Men hetta merkir á ongan hátt, at sundalagsmenn hava slept ætlanini um eina høll her á staðnum. Og teir meta seg hava fleiri fyrimunir, um talan skal verða um kapping við eina høll á Lambareiði. Ikki minst, tí talan her verður um eina høll í fullari stødd. Altso við einum vølli á 105X68 metrar, har minsta hæddin til loftið er 12 metrar. Ætlaðu áskoðaraplássini verða sambært uppskotinum 2.000 í tali.

## Ikki kommunalt projekt

Okkum eydnaðist ikki at fáa orðið á formannin hjá Kommunufelagsskapinum í Sundalagnum, Niels Andreas Mortensen, sum er burturstaddur í løtuni. Men skrivarin hjá felagsskapinum, Jens Dalsgaard, sigur, at tey framvegis meta hetta sum eina loysn, sum kundi verið sera áhugaverd.

- Talan verður tó ikki um, at tað verða kommunurnar her, sum fara at reka eina slíka høll. Tað haldi eg ikki, er rætti formurin í hesum. Talan kundi hinvegin um t.d. ein sjálvsognarstovn, har Fótbóltssambandið eisini inngekk, soleiðis at talan veruliga varð um eina høll fyri alt landið. Kommununar partur her á staðnum kundi so møguliga verið at latið lendið, men tað er so ein spurningur, sum ikki er viðgjørdur enn, tí talan hevur sum so ikki verið um nakrar konkretar ætlanir.

- Tað, sum Kommunufelagsskapurin fyrst og fremst vildi vísa á, var bara, at her var ein góður møguleiki, um ein høll skuldi gerast soleiðis, at flest møgulig fáa gagn av henni, sigur Jens Dalsgaard.

## Prísurin er ikki forðingin

Eitt av argumentunum, sum Mathias Davidsen førdi fram vegna teirra ætlan um høll á Lambareiði, var kostnaðurin. Hann førdi fram, at hendan høllin fyrst og fremst var ætlað sum venjingarhøll, og at hon tí ikki var projekterað í fullari stødd til ein fótbóltsvøll. Hetta tí ein høll í fullari stødd vildi gerast alt ov kostnaðarmikil. Bæði sum íloga og í rakstri.

Men sambært projektinum hjá felagskommununum í Sundalagnum, so heldur hetta argumentið ikki. Her er samlaði kostnaðruin mettur til 15,7 mió kr., og tá er meirvirðisgjaldið íroknað. Hetta var annars ikki tikið við í teimum 15 mió kr., sum høllin á Lambareiði ætlandi skal kosta. Ein av orsøkunum til, at kostnaðurin kann haldast á somikið lágum støði, er, at høllin verður bygd upp ímóti einum lítlum hamara, og at hesin tí virkar sum síða á høllini niðaneftir.

Heldur ikki er roknað við hita og øðrum til høllina. Talan skal snøgt sagt vera um ein yvirdekkaðan leikvøll, har neyðugir fasilitetir til skifting og annað eru íroknaðir.

## Fleiri fyrimunir

Í aðrar mátar metir Kommunufelagsskapurin, at teirra høll hevur fleiri fyrimunir fram um onnur støð. Ikki minst, tá møgulig plasering av høllini skal fastleggjast. Serliga verður víst á, at atkomuviðurskiftini til Sundalagið eru somikið góð, og at høllin landafrøðiliga kemur at liggja ógvuliga sentralt.

Tá norðoyatunnilin verður veruleiki, eru í mesta lagi 35 minuttir at koyra til høllina úr stórum parti av landinum. Undantøkini eru Sandoyggin og Suðuroyggin.

Hartil verður staðfest í útgivna bóklinginum, at vegakervið sum heild er sera væl egnað her á leiðini. Við á tekningini er eisini parkeringsøki, har einir 600 bilar eftir ætlan kunnu rúmast, og tí verður roknað við, at sleppast kann undan teimum trafikk-proppum, sum ofta fyrikoma við størri tiltøk, og sum tað eisini fyri stuttum hevur víst á í lesarabrøvum í bløðunum.

Hvussu er og ikki, so er hetta enn ein møguleiki, sum Fótbóltssambandið helst skal taka støðu til. Enn er so ikki viðgjørt, hvussu tær 12 milliónirnar frá UEFA skulu nýtast, men greitt er so í øllum førum, at fleiri hugskot eru um, hvussu hetta kann gerast.





# Parakapping



*Talan gjørdist um eina óvanliga spennandi kapping, og ikki fyrr í seinasta umfarinum fall avgerðin, tá Henrietta og Oddmar máttu geva seg fyri Arnleyg og Boga*

**Seinasta vikuskiftið varð skipað fyri FM-kapping fyri blandað pør, og her gjørdist talan um eina sera javna og spennandi kapping**

BRIDGE
*Bogi Simonsen*

Leygardagin 21. november skipaði Føroya Bridge Samband fyri árligu FM-kappingini fyri blandað pør í bridge. Leikt varð í Bridgehusinum í Havn, 13 pør luttóku í kappingini. Tað vóru teir báðir Rói á Rógvu Joensen og Heðin Mouritsen, ið skipaðu fyri kappingini og gjørdu teir eitt framúr gott arbeiði.

Henriette Svenstrup og Oddmar Danielsen sóðu leingi út til at gerast vinnarar, tey lógu á odda mesta av kappingini, men snávaðu á sjálvari málstrikuni, tá tey ið næstseinasta umfarinum tapti fyri Arnleyg Mikkelsen og Boga Simonsen, ið sostatt gjørdist vinnarar. Marjun Restorff og Dánjal Pauli Mohr lógu nærum alla kappingina í toppinum og var tað tískil ikki heppið hjá teimum at vera yvirsitarar í síðsta umfarinum.

## Luttakandi pørini:

Fríðhild Petersen – Jákup Hjaltalin
Maria Christiansen – Marner Joensen
Súsanna Dam – Jens Pauli G. Nolsøe
Laila Danielsen – Per Kallberg
Bjørg Róin – Kaj Alstrup
Jóna Grunnveit – Jógvan Juel Rasmussen
Jana Mikkelsen – Jan Eyðun Jakobsen
Marjun Restorff – Dánjal Pauli Mohr
Jórun Johannesen – Allan Dal-Christiansen
Henriette Svenstrup – Oddmar Danielsen
Ásvør Djurhuus – Hannis Jacobsen
Arnleyg Mikkelsen – Bogi Simonsen
Ingibjørg Dam – Høgni Jacobsen

## Spæl

Um ein skal vinna eina slíka parakapping, er tað av avgerðandi týdningi ikki at melda ov hart. Hetta megnaði Arnleyg Mikkelsen sera væl, eitt nú í hesum spælinum. Sigast skal eisini, at tey bæði Fríðhild Petersen og Jákup Hjaltalin spældi heilt væl í móti.

| | | |
|---|---|---|
| S/Alle | sp ED1085<br>hj K83<br>rú 4<br>kl B954 | |
| sp 9632<br>hj D1076<br>rú 873<br>kl D8 | | sp KB74<br>hj EB4<br>rú E2<br>kl K763 |
| | sp<br>hj 952<br>rú KDB10965<br>kl E102 | |

| N | E | S | V |
|---|---|---|---|
| Arnleyg | Fríðhild | Bogi | Jákup |
| | | 1 rú | pas |
| 1 sp | pas | 2 rú | A.p |

Jákup spældi hj 6 út, sum Fríðhild fekk við bóndanum. Hon spældi kl 7 aftur, ið Jákup tók við damuni fyri síðani at spæla hj damu aftur og meira hj til essið, tá ið daman átti stikkið. Fríðhild spældi seg leysa við einum rú, ið Jákup tók við essinum. Hann spældi nú sín síðsta hj, sum eg varð noyddur at stinga. Eg tók allan trumfin, men einki hjalpti, Fríðhild kastaði allar sínar sp og fekk sostatt eitt kl stikk til endans og eg fór ein niður. Hetta gav tó yvir miðal til okkara, tí Arnleyg hevði melda pass til 2 rú.

**5 tey fremstu pørini**

| | |
|---|---|
| Arnleyg Mikkelsen – Bogi Simonsen | 57 stig |
| Marjun Restorff – Dánjal Pauli Mohr | 26 stig |
| Henriette Svenstrup – Oddmar Danielsen | 23 stig |
| Maria Chritsiansen – Marner Joensen | 8 stig |
| Jana Mikkelsen – Jan Eyðun Jakobsen | -5 stig |
| Ásvør Djurhuus – Hannis Jacobsen | -5 stig |

**Multihold 2. Deild (umfar 6 væntar)**

| | |
|---|---|
| 1) Pól Joensen - Jan Eyðun Jakobsen | 21,17 (5) |
| 2) Reimund Langaard – Páll | 17,71 (6) |
| 3) Gunnar Mouritsen – Høgnio Vesturklett | 17,61 (7) |

**Toppurin 6 miðal 0**

Støðan aftaná rundu 1:

| | |
|---|---|
| 1 Fríðhild Petersen – Jákup Hjaltalin | 9 stig |
| 2 Jana Mikkelsen – Jan Eyðun Jakobsen | 8 stig |
| 3 Arnleyg Mikkelsen – Bogi Simonsen | 7 stig |

**Støðan aftaná rundu 2:**

| | |
|---|---|
| 1 Jana Mikkelsen – Jan Eyðun Jakobsen | 12 stig |
| 2 Fríðhild Petersen – Jákup Hjaltalin | 11 stig |
| 3 Arnleyg Mikkelsen – Bogi Simonsen | 7 stig |

**Støðan aftaná rundu 3:**

| | |
|---|---|
| 1 Henriette Svenstrup – Oddmar Danielsen | 18 stig |
| 2 Arnleyg Mikkelsen – Bogi Simonsen | 13 stig |
| 3 Fríðhild Petersen – Jákup Hjaltalin | 7 stig |

**Støðan aftaná rundu 4:**

| | |
|---|---|
| 1 Arnleyg Mikkelsen – Bogi Simonsen | 15 stig |
| 2 Henriette Svenstrup – Oddmar Danielsen | 13 stig |
| 3 Maria Chritsiansen – Marner Joensen | 8 stig |

**Støðan aftaná rundu 5:**

| | |
|---|---|
| 1 Henriette Svenstrup – Oddmar Danielsen | 19 stig |
| 2 Arnleyg Mikkelsen – Bogi Simonsen | 11 stig |
| 3 Jórun Johannesen – Allan Dal-Christiansen | 8 stig |

**Støðan aftaná rundu 6:**

| | |
|---|---|
| 1 Henriette Svenstrup – Oddmar Danielsen | 32 stig |
| 2 Marjun Restorff – Dánjal Pauli Mohr | 19 stig |
| 3 Arnleyg Mikkelsen – Bogi Simonsen | 15 stig |

**Støðan aftaná rundu 7:**

| | |
|---|---|
| 1 Henriette Svenstrup – Oddmar Danielsen | 31 stig |
| 2 Marjun Restorff – Dánjal Pauli Mohr | 21 stig |
| 3 Arnleyg Mikkelsen – Bogi Simonsen | 19 stig |

**Støðan aftaná rundu 8:**

| | |
|---|---|
| 1 Henriette Svenstrup – Oddmar Danielsen | 43 stig |
| 2 Marjun Restorff – Dánjal Pauli Mohr | 27 stig |
| 3 Arnleyg Mikkelsen – Bogi Simonsen | 24 stig |

**Støðan aftaná rundu 9:**

| | |
|---|---|
| 1 Henriette Svenstrup – Oddmar Danielsen | 44 stig |
| 2 Marjun Restorff – Dánjal Pauli Mohr | 33 stig |
| 3 Arnleyg Mikkelsen – Bogi Simonsen | 24 stig |

**Støðan aftaná rundu 10:**

| | |
|---|---|
| 1 Henriette Svenstrup – Oddmar Danielsen | 46 stig |
| 2 Marjun Restorff – Dánjal Pauli Mohr | 31 stig |
| 2 Arnleyg Mikkelsen – Bogi Simonsen | 31 stig |

**Støðan aftaná rundu 11:**

| | |
|---|---|
| 1 Henriette Svenstrup – Oddmar Danielsen | 43 stig |
| 2 Arnleyg Mikkelsen – Bogi Simonsen | 37 stig |
| 3 Marjun Restorff – Dánjal Pauli Mohr | 25 stig |



*Fyrireikararnir eiga stóra tøkk fyri eina framúr góða tilrættislegging. Her Heðin Mouritsen sum saman við Róa á Rógvu Joensen stóð fyri kappingini*